Starvslýsing

Sosialurin



# Sølufólk til Sosialin

Ert tú fyrikomandi, dugir væl at selja, ert álítandi, røkin og dugir at arbeiða sjálvstøðugt og undir trýsti, so ert tú júst tann, vit leita eftir.

Til marknaðardeild okkara søkja vit eftir einum starvsfólki, sum kann verða við til framhaldandi at menna inntøkugrundarlag okkara.

Lýsingarinntøkur eru ein týðandi partur av tilverugrundarlagnum hjá føroysku fjølmiðlunum, og tí leita vit støðugt eftir nýggjum hættum at menna hendan partin av fyritøkuni. Tí er tørvur á fólkum, sum duga at fáa, og ikki minst, arbeiða víðari við góðum hugskotum.

Í samstarvi við starvsfelagarnar á marknaðardeildini verður tú við í dagligu framleiðsluni av blaðnum. Herundir tilrættislegging av lýsingarátøkum og temabløðum. Umframt hetta, verður tú ein týðandi partur av søluarbeiðinum hjá Sosialinum, Rás2 og Portalinum.

Løn verður ásett sambært avtalu.

Er hetta nakað fyri teg, so er bert at senda eina umsókn við frágreiðing um útbúgving og royndir til Sosialin. Ynskir tú at fáa meira at vita um størvini, ert tú vælkomin at ringja á tel. 341823 / 222081. Tað ber sjálvandi eisini til at senda teldupost á gudny@sosialurin.fo

Starvið verður at seta skjótast gjørligt. Umsóknarfreistin er týsdagin 28. juli og skal umsóknin saman við viðkomandi skjølum sendast til:

**Sosialurin**
Att.: Gudny Langgaard
Postsmoga 76
FO – 110 Tórshavn

Sosialurin · Postboks 76 · FO-110 Tórshavn

Samtakið kring Miðlahúsið fevnir í dag um tríggjar miðlapallar. Blaðútgávu, tíðindaflutning á netinum og útvarp. Tilsamans starvast um 45 fólk í samtakinum.


**Klaksvík 6. - 8. august**

www.summarfestivalur.fo

# Juli-kappingin

Vinnari av sudoku-kappingini í juni gjørdist:

Jonna E. Kruse, Tórshavn

NORÐOYA SPARIKASSI

FØROYA TELE

## SUDOKU

Hvønn dag í juli mánaða verða Sudoku uppgávur at finna í Sosialinum.

Jú fleiri uppgávur, ið tú hevur loyst, tess størri møguleika hevur tú at vinna.

Sendið okkum loysnina innan mikudagin 5. august 2009 kl. 10.00 og merkið brævbjálvan »Sudoku«.

Drigið verður í viku 32.

Fyri at vera við í kappingini, skal øll uppgávan verða loyst.

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | | | | 6 | 7 | |
| 9 | | | | 5 | | 4 | | |
| 8 | 3 | | 9 | | | | | |
| | | | 6 | | 1 | 2 | | |
| | 1 | | | 7 | | | 4 | |
| | | 5 | 3 | | 4 | | | |
| | | | | | 6 | | 1 | 4 |
| | | 1 | | 3 | | | | 8 |
| | 7 | 6 | | | | | | |

## Vinningurin í juli

4 vikuskiftispass til Summarfestivalin, sum verður í Klaksvík 6.-8. august í ár.

**Virði: kr. 3.800,-**



Navn: ______________________

Bústaður: ______________________

Telefon: ______________________

Sendið til: Sosialin · Boks 76 · 110 Tórshavn
Merkið brævbjálvan »Sudoku«

